Kunngjørt verður, at elskaða mamma okkara

**Herdis Mortensen**
**Argir**

andaðist leygardagin 8. januar á Landssjúkrahúsinum, 78 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum týsdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Argja kirkju mikudagin kl. 13.00.

***Børnini***
**Hansa, Jákup Andreas,**
**Magnhild og Johannis**



## TØKK

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum vístu samkenslu, hjálpsemi og umsorgan, tá

**Ingunn Winther Olsen**
**Vestmanna**

doyði og fór til gravar.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jákup, Fía og Heðin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, sum á ymiskan hátt hjálptu okkum, tá elskaði sonur, pápi og beiggi okkara

**Pauli Rasmussen**

kom heim og fór til gravar. Tøkk til Smyril Line, sum førdi okkum hann heim. Tøkk til Theodor Olsen, prest fyri troystarrík orð, tøkk til sangarar og berarar og tøkk til ta stóru fjøld, sum fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Tøkk fyri uppringingar, gávur, blómur og kransar. Ein hjartans tøkk til systkin og alla familjuna, vinir og kenningar fyri umsorgan, samkenslu og hjálpsemi undir hansara longu sjúku. Hjartans tøkk til tykkum mongu, sum hjálptu til við jarðarferðina.

Tøkk til floksfelagarnar, fyri at tit altíð royndu at vitja Paula, tá vit vóru har heima. Tøkk til sambýlið í Vestmanna fyri hjálp, tá vit vóru heima og vitjaðu.

**Ivanda, Kirstin og systkini við familju**

# Kjak



Sjúrður Skaale

# Rættleiðing til Eyðgunn Samuelsen

*Viðhvørt er tað, at fortelja eina hálva søgu, tað sama sum at fortelja eina skeiva søgu*

**Góða Eyðgunn!**
Tú sigur í grein, at eg "blæsi og havi mjøl í munninum", tí eg kritiseri lógina um kringvarpsgjald, men stemmaði fyri hesi somu lóg á tingi.

Hetta er eitt sindur soleiðis ... lumpisligt. Tí tú fortelur bara ein part av søguni.

Lógin um KV-gjaldið var í einum "lógarpakka". Í pakkanum var lógin um KV-gjaldið - og ein lóg, sum tók burtur skottið millum tíðindadeildirnar í útvarpi og sjónvarpi.

Eg hevði virkað nógv fyri at fáa skottið millum tíðindadeildirnar burtur, og tað bleiv við hasi lógini loyst beint eftir mínum høvdið. Tí fekk eg meg illa til at stemma ímóti tí.

Fyri at markera heilt greitt, at eg kortini IKKI tók undir við hinum partinum av pakkanum (KV-gjaldinum), gjørdi eg hetta:

**1.** Tók greiða frástøðu frá tí í mínum minnilutaáliti.

**2.** Talaði harðliga ímóti tí undir viðgerðini - og átalaði, at tvær heilt ymiskar lógarbroytingar vóru í sama "pakka", so vit ikki fingu tikið støðu til tær hvør sær.

**3.** Setti fram broytingaruppskot um, at KV-gjaldið skuldi krevjast inn umvegis skattin.

Eg gjørdi altso alt tað, eg kundi, fyri at fáa ein annan fíggingarhátt til KVF. Tá tað ikki eydnaðist, stóð eg í eini tvístøðu. Men eg endaði við at atkvøða fyri pakkanum.

Tað er, sigur tú, at "blæsa og hava mjøl í munnum".

Men hvat nú um eg hevði stemmað ímóti pakkanum? Hevði tú so sagt, at eg "blæsi og havi mjøl í munninum" í málinum um tíðindadeildirnar?

Viðhvørt kann mann pella við bara at fortelja helvtina av sannleikanum...

WWW.SOSIALURIN.FO